Lagt til rættis: Eydna Skaale

# TEKNISKU SKÚLARNIR

**Á teknisku skúlunum verður handverk tvinnað saman við ástøði. Teknisku skúlarnir bjóða eitt breitt úrval av útbúgvingum, sum eru ymiskar til longdar. Tveir tekniskir skúlar eru í Føroyum, ein í Havn og ein í Klaksvík**

**WWW.TST.FO** **WWW.TSK.FO**







Tekniski skúli í Havn og Klaksvík

## SIT

Teknisku skúlarnir bjóða eina miðnámsútbúgving, nevnd SIT. Hetta er ein tvey ára long útbúgving, sum leggur serligan dent á tað handverksliga, men eisini hevur aðrar lærugreinar, sum føroyskt, enskt og støddfrøði.

í Havn ber til at taka SIT á træ-, el-, bil-, stíl & snið-ella metaldeildini. Í Klaksvík ber til at fara á maskin-, el-ella byggideildina.

Fyrsta árið snýr seg serliga um evni innan ta breytina, tú hevur valt. Seinna árið er ofta merkt av ymsum verkætlanum, har næmingarnir veruliga skulu royna seg.

Eftir fyrsta støðisárið ber til at fara í læru og fáa eftirgivið nakað av lærutíðini.

Eftir lokna tvey ára SIT útbúgving ber til at fara undir víðari lesnað eitt nú til maskinmeistara, framleiðslutøkning, el-installatør ella byggitøkning.

Ætlar tú tær handverksliga vegin, liggur væl fyri við eini SIT útbúgving. Til ber eisini at nýta SIT sum grund undir ávísum akademiskum útbúgvingum, t.d. inginørútbúgvingum.

**Freistin at søkja inn á SIT-útbúgvingarnar er 15. mars.**

Tekniski skúli í Havn

## Byggitøkningur

Útbúgvingin til byggitøkning er ein tvey ára long yrkisakademiútbúgving, sum samsvarar við tvey tey fyrstu árini av byggifrøðingaútbúgvingini. Hetta er sostatt ein miðallong hægri útbúgving.

Útbúgvingin miðar m.a. ímóti størvum í byggivinnuni, virkjum, ið framleiða byggitilfar ella hjá ráðgevandi verkfrøðingum. Útbúgvingin tekur 2 ár, og fevnir m.a. um virkisrakstur, útrokningar, byggimálsviðgerð, projektstýring og byggiframleiðslu.

TST hevur avtalur við danskar skúlar um víðari lestur eftir lokna útbúgving. Sum byggitøknigur er møguleiki at lesa víðari til bygningskonstruktør í Danmark (4. og 5. semestur í DK) Møguleiki er at taka 6. og 7. semestur í Føroyum (praktikk og endaligu verkætlanina)

Upptøkukrav er miðnámsútbúgving, SIT (2 ár) ella lærlingaútbúgving.

Teksniski skúli í Havn

## Framleiðslutøkningur

Framleiðslutøkningur er ein yrkisakademiútbúgving, sum tekur 2 ár.

Sum lesandi fert tú í útbúgvingartíðini at arbeiða nógv við nýskapan og menning. Undir útbúgvingini lærir tú m.a at: Stovna og leiða eina fyritøku, Samskifta innan- og uttanhýsis, analysera trupulleikar og finna heildarloysnir, gera uppskot til optimering av framleiðslu og menna starvsfólk

Byggitøkningur og Framleiðslutøkningur eru báðar 2-ára Yrkisakademiskar útbúgvingar.

TST hevur avtalur við danskar skúlar um víðarilestur, aftaná lokna útbúgving. Sum framleiðslutøkningur er møguleiki at lesa víðari til maskiningeniør og fáa eitt ár góðskrivað av útbúgvingini, ella lesa víðari til »Proffesionsbachelor í Produktudvikling og teknisk integration«.

Upptøkukrøvini eru: miðnámsútbúgving, SIT (2 ár) ella lærlingaútbúgving.

***Lærlingaútbúgvingar** krevja, at næmingarnir hava eitt lærupláss og ein lærusáttmála. Síðani er útbúgvingin býtt upp í tíðarskeið í skúlanum og tíðarskeið á læruplássinum. Nógvar handaligar útbúgvingar eru at velja ímillum*



Tekniski skúlin í Havn og Klaksvík

## El-innleggjari

El-innleggjarin arbeiðir við at leggja sterk- og veikstreym í t.d. sethús, skrivstovur, virki, skúlar og umborð á skipum. El-innleggjarin fæst eisini við tele-, teldu-, og antennuinnleggingar.

Víðari ber til at læra til el-installatør, KT- og elektronokktøkning, framleiðslutøkning, verkfrøðing, stærkstrømsteknikara, 1 ár HF + ingenør, IT- og elektronik teknolog, byggitøkning og framleiðslutøkning.





Tekniski skúli í Havn

## Rørsmiður

Rørsmiðurin arbeiðir við nýgerð og viðlíkahaldi av vatn-, hita-, gass- og ventilatións-innleggingum í sethúsum, virkjum og skipum.

Víðari ber til at læra til: maskinmeistara, framleiðslutøkning og verkfrøðing.

Tekniski skúlin í Havn

## Hárfríðkanarfólk

Hárfríðkanarstarvið er fjølbroytt, og arbeiðsmøguleikarnir eru nógvir. Flestu sveinarnir arbeiða á hárfríðkanarstovum, men til ber eisini at starvast innan sjónleik ella í sjónvarpinum. Hetta er eitt øki, sum broytist skjótt, tí mótin skiftir ofta. Tí eru hárfríðkanarøkið merkt av nógvari menning og skeiðsvirksemi.

Víðari ber til at læra til stylist, kosmetikara, kostmetolog, make-up Artist og manicurist.



Tekniski skúlin í Havn og Klaksvík

## Maskinsmiður

Maskinsmiðurin arbeiðir millum annað við fresing, dreying, boring, sveising og skrúvustiksarbeiði av maskinlutum og øðrum stálkonstruktiónum.

Arbeiðið fevnir eisini um forritan og framleiðslu við teldustýrdum maskinum, umframt viðlíkahaldi av motorum og automatikkstýrdum skipanum.

Víðari ber til at læra til maskinmeistara, framleiðslutøkning og verkfrøðing.



Tekniski skúlin í Havn

## Bygningssnikkari

Bygningssnikkarin nýtir á verkstaðnum framkomnar maskinur at gera t.d. hurðar, vindeygu, skáp og køkar og annars alt vanligt uttan- og innandura snikkaraarbeiði.

Bygningssnikkarar gera eisini lakkarbeiði, umframt at leggja gólv.

Víðari kann lærast til: byggiteknikara, byggifrøðing, verkfrøðing og arkitekt